Sosialurin

Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

# VARPIÐ

DR1 • Leygardagin kl. 21.35

## Liberty Stands Still

Liberty rekur ein gevandi vápnahandil saman við manninum. Joe hevur upplivað sorgina, tá dóttirin varð skotin í einum elddysti. Ein dagin hittast tey, og nú noyðist Liberty at rannsaka alt lív sítt.



Canal+Film1 • Fríggjadagin kl. 19.00

## Perfect Opposites

Drew og Julia hittast á College og verða forelskað. Tey hava bert kent hvønn annan í nakrar mánaðir, tá tey flyta til Los Angeles, har Drew skjótt kennir seg væl. Julia noyðist tó at ásanna, at stórbýarlívið ikki er júst tað, sum hon kundi hugsað sær.



3+ • Leygardagin kl. 20.00

## The Gingerbread Man

Rick Maguder er ein væl dámdur suðurstatsadvokatur, sum er á veg heim úr eini veitslu, tá hann hittir ternuna, Mallory. Tey eru saman hesa náttina, og tá Mallory greiðir frá, at hon flýggjar undan svaka pápa sínum, ið hevur lovað at myrt hana, gevur Maguder henni lyfti um, at hann skal senda pápan handan rimar.

FRÍGGJADAGUR 16. MARS 2007

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið